Følagsgal 28

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 TÓRSHAVN

Tórshavn 17. januar 2020

Okkara tilv./Our ref.:
5398-3894/Jórun/Almann-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar til vælferðarlógina

Víst verður til uppskotini løgtingslóg um almannatrygd og vælferð og løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin, sum varð sent okkum til hoyringar hin 23. desember 2019.

Eins og áður víst á er støðan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, at almennar uppgávur í størri mun eiga at verða lagdar til privatar veitarar. Tað eru serliga §§ 28 og 67 í vælferðarlógini, sum geva heimild fyri, at avtalur um tænastur nú eisini kunna verða gjørdar við privatar útleigarar og veitarar. Hetta gevur eina eyka trygd hjá brúkaranum fyri at fáa neyðugar veitingar, og hetta ger skipanina meira liðiliga. Eisini verður mett, at hetta kann skapa møguleika fyri búskaparliga skilabetri loysnum. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur tí sjálvsagt undir við hesum broytingum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at ráðgeving og veiting av hjálparráðum frá privatum veitarum eisini eiga at verða tikin við í hesa lóg, t.d. í § 67.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ikki aðrar viðmerkingar til lógaruppskotini.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Jórun Gardar

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo